

# TVÆR HM EIN STADION

**HM2010** Argentina og Týskland hava spælt ímóti hvørjum øðrum í tveimum HM-finalum. Onnur var hendingarík og spennandi, meðan hin var tann ringasta í HM-søguni. Í 2006 var tað ein týskari rundan um vøllin, ið gjørdi vart við seg í fjórðingsfinaluni landanna millum

Heri Simonsen

HM-fjórðingsfinalan millum Argentina og Týskland verður tann sætti dysturin millum londini bæði í einum HM-endaspæli. Í 1986 spældu londini eina tað bestu HM-finaluna nakrantíð í einum hendingaríkum og málríkum dysti, meðan somu londini spældu ta keðiligastu HM-finaluni í søguni í 1990, har einasta málið kom uppá brotsspark seint í dystinum. Í hesari HM-kappingini hava bæði Argentina og Týskland víst framúrskarandi spæl og máltev, og tað gevur vónir um, at fjórðingsfinalan í Cape Town, sum byrjar leygardagin klokkan trý føroyska tíð verður ein hendingarík, og málrík fjórðingsfinala, sum fer at standa sum ein prýðiligur varði fyri tann álopshugaða fótbóltin.

## 11 finalur millum sín

Argentina og Týskland hava verið meir ella minni fast inventar í hvørjum HM-endaspæli við onkrum hendinga undantaki, og hava londini 11 HM-finalur millum sín. Argentina var í fyrstu HM-finaluni í 1930, og teir vóru aftur í HM-finalunum í 1978, 1986 og í 1990. Argentina vann á Hollandi í 1978, og á (vestur) Týsklandi í 1986. Týskland var í HM-finaluni í 1954, 1966, 1974, 1982, 1986, 1990 og í 2002. Týskland vann á Ungarn í 1954, á Hollandi í 1974 og á júst Argentina í 1990. Argentina hevur vunnið Copa America 14 ferðir, og Týskland hevur vunnið EM tríggjar ferðir, so talan er um tvær av teimum mest sigursvandu fótbóltstjóðunum í heiminum.

## Fyrstu ferð í 1958

Fyrstu ferð londini møttust í einum HM-endaspæli, var í HM-endaspælinum í Svøríki í 1958. Liðini vóru í bólki saman. Hini londini í bólkinum vóru Norðurírland og Kekkoslovakia. Týskland skuldi verja sítt heimsmeistaraheitið frá 1954, og teir vunnu ein rættiliga sannførandi 3-1 sigur á Argentina, har hetjan frá HM-finaluni í Bern í 1954, Helmuth Rahn skoraði tvey mál. Argentina kom annars á odda í triðja minutti, men týskarar gjørdu tað, sum teir so ofta gera, teir komu afturíaftur og vunnu at enda trygt dystin, sum var spældur á leikvøllinum í Malmø. Argentina endaði aftast í bólkinum, meðan Týskland kom í hálvfinaluna, har teir taptu ímóti Svøríki. Bronsudystin taptu teir ímóti Fraklandi.



TÝSK FRØI Í ROM

Lothar Matthäus og Rudi Völler fegnast um HM sigurin í 1990, sum tó var ein tann keðiligasta finalan í HM-søguni. Høgrumegin sæst Andreas Brehme skora sigursmálið uppá brotsspark.






VAKUR STUÐUL

Argentinsku leikararnir fáa góðan stuðul frá áskoðarunum í Suðurafrika

## Aftur í bólki saman í 1966

Tá HM-endaspælið var í Onglandi í 1966 vóru Týskland og Argentina aftur í bólki saman. Bæði liðini vóru ógvuliga sannførandi í bólkaspælinum. Týskland vann 5-0 á Sveis og 2-1 á Spania, meðan Argentina vann 2-1 á Spania og 2-0 á Sveis. Tí var tað kanska ikki so løgið, at innanhýsis dysturin millum liðini á Villa Park í Birmingham endaði við javnleiki 0-0. Argentina tapti 0-1 til Ongland í fjórðingsfinaluni, har teir vóru dekan ov harðligir. Hetta fekk enska venjaran, Alf Ramsey at nevna argentinar »animals«, og tað fall ikki í góða jørð. Týskland spældi seg í finaluna, men har taptu teir 2-4 ímóti Onglandi. Málið til 3-2 hevur nú fingið ein kappingarneyta sum mest umrødda hending í HM-søguni, nevnliga dundurskotið hjá Frank Lampard, sum fór ¾ metur inn um týsku málstrikuna, men ikki bleiv viðurkent.



HØVD ELLA KRÓNA

## HM-finalan í 1986

20 ár gingu, áðrenn liðini møttust aftur í einum HM-endaspæli. Hesaferð í tí fyrstu HM-finaluni, sum var sjónvarpað beinleiðis í Føroyum. Dysturin, sum var spældur tann 29. juli er ikki bara minniligur fyri føroyingar, sum eru 35 ár og eldri av hesi orsøk. Talan var um eina veruliga góða og væl spælda finalu. Týskarar vóru í sínari aðru finalu á rað, meðan Argentina hevði vunnið HM á heimavølli átta ár áðrenn. Heili 114.600 áskoðarar vóru til finaluna á Azteca leikvøllinum í Meksiko býi, sum var spæld í nógv-



Maradona kyssir HM-steypið eftir sigurin á Týsklandi í Meksiko 1986